Í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein

# Rættur føroyskur rockur



Stjórin á plátufelagnum RecArt, sum gevur nýggju fløguna hjá The Dreams út í Danmark heldur, at The Dreams er eitt gott umboð fyri føroyskan rocktónleik.

- Eg havi fylgt við føroyskum rocktónleiki í fleiri ár, og eg haldi meg hava hoyrt eitt serligt slag av rocktónleiki í Føroyum, sum The Dreams nú hava tikið eitt stig víðari. Teir eru eitt umboð fyri tann aggressiva – og eitt sindur illa – slagið av føroyskum rocki, sigur Jens Ove Friis.

- Eg havi áður nevnt, at føroyskir tónleikabólkar kundu brúkt okkurt serføroyskt í sínum tónleiki, men tað er ikki tað, sum The Dreams gera. Men teir ljóða sum eitt føroyskt rockorkestur hóast tað, sigur hann.

# Meira Led Zeppelin



**Rockbólkurin Led Zeppelin gjørdi í fjør comeback við eini serligari konsert í London, og tað er líkt til, at rockbólkurin verður aftur at hoyra á palli í næstum. Led Zeppelin verður eftir øllum at døma við á eini stuttari konsertferð saman Matallica, Pearl Jam og Kanye West. Konsertferðir í USA varðar í triggjar dagar og kallast Bonnaroo Arts and Music Festival. Harafturat er møguleiki fyri, at Led Zeppelin fer á eina longri konsertferð móti endanum av hesum árinum.**



# Spice Girls gevast – aftur

Ensku Spice Girls, sum í fjør gjørdu comeback og fóru á konsertferð, hava nú boðað frá, at tey fara ikki at spæla allar konsertirnar, sum standa á skránni. Orsøkin er, at ein av songkvinnunum í bólkinum, Mel C, vil ikki verða við á eini longri konsertferð, og tí hevur bólkurin valt at steðga konsertferðini fyri tíð. Konsertir í Suðurafrika, Argentina, Kina og Australia eru avlýstar.

# Gjørdi ilt verri

Umboðsmaðurin hjá Britney Spears verður nú lagdur undir at hava gjørt støðuna hjá songkvinnuni so ringa, sum hon er, nú Spears er innløgd á sálarsjúkrahúsi og er gjørd ómyndug. Sam Lufti skal sambært mammu Britney Spears hava givið Britney tablettir, rúsevni, hann hevur tikið løðaran til fartelefonirnar frá henni og hevur hótt hana. Nú hevur rætturin biðið Sam Lofti halda seg í minsta lagi 228 metrar burtur frá Britney Spears.



# Sjónleikarar velja síðu

**Sjónleikarar í Hollywood royna at veita stuðul til tey forsetavalevnini, sum teimum dámar best. Ein long røð av sjónleikarum stuðla demokratisku valevnunum, meðan nakað færri viðurkenna sín stuðul til republikanararnar.**
**Millum tey, sum stuðla republikanarunum, eru Arnold Schwarzenegger, Sylvester Stallone, Chuck Norris, Jon Voigt og Adam Sandler.**
**Millum tey, sum stuðla demokratunum, eru Barbra Streisand, Elizabeth Taylor, Tom Hanks, Paul Newman, George Clooney, Julia Roberts, Robert De Niro og Jodie Foster.**



Sosialurin